**Taðing við súrløgi**

Ein roynd bleiv gjørd at taða gamlan bø við súrløgi úr laksaslógvi. Endamálið við royndini var, at kanna hvussu nógv grasið svíðist av súrløginum og at fylgja við hvussu long tíð gongur, til grasvøksturin aftur er í lagi. Grasúrtøkan bleiv ikki skrásett. Hitaviðgjørdur súrløgi bleiv fingin til vega frá Salmon Proteins á Eiði. Súrløgurin bleiv blandaður við vatni í seks ymiskum lutføllum og sprændur á bøin 3. juni 2009. Blandingslutfallið var í prosentum:

| Súrløgur | Vatn |
|---|---|
| 100 | 0 |
| 80 | 20 |
| 60 | 40 |
| 40 | 60 |
| 20 | 80 |
| 0 | 100 |

Úrslitið vísti, at har óblandaður súrløgur bleiv koyrdur á, bleiv at kalla alt grasið avsviðið. Og hóast vatn bleiv blandað uppí, bleiv eisini nógv avsviðið. Væl meira enn helmingurin av grasinum bleiv sviðið av, hóast vatnprosentið var 80. Men eftir stuttari tíð fór bøurin at koma fyri seg aftur, og aftaná seks vikur var hann grønur aftur.




*Mynd… Svíðing av grasi í seks vikur aftaná viðgerð við ymiskum blandingum av vatni og súrløgi. (100: einki sviðið, 0: alt sviðið)*

Niðurstøðan av royndini er, at súrløgur svíðir grasið, men um sprænt verður meðan gróður er, er grasið komið fyri seg aftur aftaná seks vikur, eisini um súrløgurin er óblandaður. Hvørki grasúrtøkan ella grassamansetingin bleiv kannað.



Mynd… Vinstrumegin taðað við súrløgi. Høgrumegin óviðgjørt.